# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantarnir í 1914



Konfirmantarnir um hesti 1914: Tvær konfirmatiónir vóru um heystið í 1914, tann fyrra var 4. oktober og tann seinna 11. oktober.

Til tað fyrru konfirmatiónina vóru 25 konfirmantar, og til tað seinnu vóru teir 9. Myndin er uttan iva av tí fyrru konfirmatiónini. Á myndini eru 23 konfirmantar.

Tey, sum blivu fermd tann 4. oktober 1914 vóru: Kathrine Henriksen (Kirkjubø), Anna Hansen (Havn), Klemma Ragnhild Johannesen (Havn), Marie Sophie Bærentsen (Havn), Anna Sofie Amalie Egholm (Havn), Else Juliane Arge (Havn), Julie Jacobine Thomsen (Nólsoy), Alma Katy Fosaa (Havn), Anna Margrethe Sofie Rein (Havn), Jenny Jakobine Augusta Hansen (Havn), Alexandra Christine Christiansen (Havn), Susanne Olsen (Borðan), Marie Dorthea Udbø (Havn), Sunneva Poulsen (Havn), Attilia Florentine Hansen (Havn), Johannes Albin Bærentsen (Havn), Ludvig Joensen (Havn), Frans Danielsen (Hestur), Hans Peter Hansen (Argir), Willum Stein Poulsen (Velbastaður), Jakob Martin Frits Joensen (Havn), Christian Finnur Finnsson (Havn), Jacob Andreas Zakarias Severin Petersen (Havn), Jens Hansen (Nólsoy) og Zakarias Emarius Christiansen.

Vit kenna 3 av nøvnunum á myndini. Drongurin aftast nr. 3 f.v., er Jens Hansen (Nólsoy). Gentan nr. 3 frá vinstru í miðraðnum er Julie Jacobine Thomsen (Nólsoy) og gentan nr. 3 f.h. í miðraðnum, er Susanne Olsen, úti á Borðini. Hon er í hvítum kjóla.

Konfirmantarnir tann 11. oktober 1914 vóru: Johannes Sofus Olsen (Havn), Laurids Christian Reinert (Norðradalur), Zacharias Emarius Jensen (Stykkið), Poul Poulsen (Eiði), Thomas Nygaard (Eiði), Karl Ingvard Johannesen (Hvalvík), Eline Susanne Irena Johansen (Havn), Marie Olsen (Havn) og Anna Malene Joensen (Havn). Møguliga er mynd tikin av teimum 9 konfirmantunum sum blivu fermdir tann 11. oktober 1914.

Um so er, hevði tað verið gott um onkur hevði upplýsingar um myndina. Tey, sum kenna fólk á myndini, kunnu ringja til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647, so vit kunna fáa røttu nøvnini á røttu persónarnar.

*Mynd: Anna Juul Thomsen, Nólsoy*

### Brúdleyp

Fríggjadagin 14. oktober *giftust* í prestagarðinum í Kvívík Rannvá Dam og Sten Hjaltalin Jensen, Leynum.

### Prógv

7. oktober fekk Dánjal Pauli Poulsen, Vatnsoyrar, prógv í Industriens Lederuddannelse frá Dansk Teknologisk Institut. BP og Amerada Hess hava játtað stuðul til hesa førleikamenning.

### 80 ára føðingardagur

Týsdagin 18. oktober verður Kjartan Dalbúð, Fuglafirði, 80 ár. Dagurin verður hildin í Vesturstovu millum kl. 18.00-21.00.

### Dagurin

**18. oktober. Lukas.** Evangelistur og ápostlasøguskrivari. Halgisøgan sigur, at hann eisini var listamálari og málaði eina mynd av Mariu Moy. Eisini verður sagt, at hann doyði friðarliga 84 ára gamal.

Navnið er grikst og merkir maður úr Suðuri.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum sum sýndu samkenslu,
tá kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**John Nielsen**
Hvalba

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Missiónshúsið.
Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Birgit**
**Bjørg, Páll, Sunniva og Bjartur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt
vístu samkenslu og hjálptu til, tá ið okkara kæra
mamma, vermamma, omma og langomma

**Maja Dalsgarð**
Argir

andaðist og fór til gravar.
Takk fyri alla umsorgan og stuðul.
Tí at lívið er mær Kristus, og deyðin ein vinningur.
Filip 1:21

*Familjunnar vegna*
**Sigrid, Mortan, Jóannes, Rakul og Betty**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at góða mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Sigrid Semona Gaard**
Oyndarfjørður

andaðist á Eysturoyar Ellis-og Røktarheimi
sunnudagin 16. oktober, 92 ára gomul.

Kistan fer av Røktarheiminum týsdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Oyndarfjarðar kirkju
mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Elin, Jens Petur, Sigga og Margretha**